

## Kombikk og krabbar

**Dagstovnurin í Løkjatúni søkir eftir 6 fólkum**

**Hevur tú hug**
at mynda dagligdagin so hann gert spennandi og mennandi bæði fyri børn og vaksin?
So kunnu vit kunnu bjóða tær eitt spennandi arbeiði har hugfloðið setir dagsskránna.

**Vit bjóða**
Dagstovnuri í Løkjatúni er ein sonn perla, sum liggur oman til Sandá og eitt hanagleiv frá Sandagerði. Vit hava bø og haga beint uttanfyri vindeyga og eitt innanduraumhvørvið við øllum nýmótans hentleikum harímillin eitt vælútbygt verkstað.

Dagstovnurin er ein samansettur stovnur við vøggustovu, barnagarði og frítíðarskúla.

**Søkt verður eftir**
- Trimum pedagogum at arbeiða 30-40 tímar um vikuna at byrja 7. august 2006 ella eftir nærri avtalu.
- Trimum hjálparfólkum at arbeiða 30-40 tímar um vikuna at byrja 7. august 2006 ella eftir nærri avtalu.

**Vit vænta, at**
- tú ert aktiv/ur
- sært møguleikarnir í hesi perlu
- ert áhugað/ur at skapa ein tryggan og spennandi gerðandisdag

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Dagstovninum í Løkjatúni, Løkjatún 5, 160 Argir, í hendi í seinasta lagi mánadagin 31. juli 2006.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Anniku Johannesen, stovnsleiðara, tlf. 573688.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo/leysstorv**
www.torshavn.fo er at síggja á Býarbókasavninum, í Snarskivuni og í Kunningarstovuni

**Tórshavnar kommuna**

# Nólsoyar skúli

Skúlaárið 2006/07 eru trý tíðaravmarkað størv at søkja í Nólsoyar skúla :

1 fulltíðarstarv fyri lærara í farloyvi
1 fulltíðarstarv vegna avlopstímar, lækkað tímatal og serligan tørv
1 starv uml. 7 t/v vegna avlopstímar

Størvini verða sáttmálasett uttan so, at tann, ið settur verður er tænastumannasettur frammanundan. Til eitt av størvunum verður endaliga tímatali ikki ásett fyrr enn 1. sept. 2006.

Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4

Nólsoyar skúli er lítil skúli við uml. 30 næmingum frá 1. til 9. flokk.

Flokkarnir eru í flestu førum samanlisnir í 3 bólkum eftir aldri.

Vit arbeiði í tøttum toymi og nógv av undirvísingini hevur støði í tvørgreinaligum, verkætlanarvendum arbeiðsgongdum, sum tekur støði í einkulta næminginum.

Hetta er spennandi, gevandi, men eisini avbjóðandi undirvísingarháttur og krevur :

- Tætt toymissamstarv
- Sjálvsstøði
- Hugflog og nýhugsan
- Góð samskiftisevni
- Evni at hava yvirlit

Umsøkjarar skulu kunna undirvísa á 1. undirvísingarstigi (1.-3.fl.) serundirvísing/serligur tørvur og annars innan fleiri lærugreinaøki frá 1. til 9. flokk.

Umsóknir við avrit av prógvi, c.v. og møguligum viðmælum skulu verða skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi mánadagin 24. juli kl. 14.00

Nærri upplýsingar fáast frá Gunnvør Joensen, skúlaleiðari tlf. 327119 ella 392465. Teldupostadr. Gunnvoer.joensen@skulin.fo

# Summarfrí

24. juli - 11. august

Vegna summarfrí er avgreiðslan stongd frá mánadegnum 24. juli til fríggjadagin 11. august, báðir dagar íroknaðir. Opið verður aftur sum vanligt mánadagin 14. august.

Telefonavgreiðslan er tó opin mánadag til fríggjadag kl. 10:00 - 12:00. Eisini er møguligt at seta seg í samband við Barsilsskipanina um telefax ella teldupost.

**Barsilsskipanin**

Barsilsskipanin · Smyrilsvegur 20 · 100 Tórshavn
Tel 35 35 55 · Fax 35 35 56 · barsil@barsil.fo
www.barsil.fo

## *STARVSFÓLK*

Søkt verður eftir tveimum starvsfólkum:

· Skrivstovufólk til 3/4 tíð
· Sølufólki

Skrivlig umsókn skal sendsast til:
*Eikin · Postsmoga 2203 · 160 Argir*

**· Eikin ·**

*- eitt sindur hugnaligari*

# Fjarskiftiseftirlitið

Vegna summarfrí verður skrivstovan stongd í vikunum **30** og **31**.

Opið verður aftur mánadagin 7. august.

**Post- og Fjarskiftiseftirlitið**

# Summarferia

Vit hava stongt vegna summarferiu frá 31. juli til og við 20. august.

**Harraklipping í Vágsbotni**

## KIOSK ACTIV

Starvsfólk søkist til dagarbeiði
ca. 40 tímar um vikuna

**Tlf. 233740 ella send umsókn til**
**Kiosk Activ · J. Broncksgøta 44**

# Dagrøktari til dagrøktina á Skála

Runavíkar Kommuna søkir eftir dagrøktara at byrja 14. august.

Viðkomandi skal hava áhuga og hegni at arbeiða við børnum.

Dagrøktarheimið skal vera soleiðis innrættað, at tað er gott og trygt at spæla innan- og uttandura.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi starvinum fáast við at venda sær til dagrøktarleiðaran á tlf. 586004.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi seinast fríggjadagin 28. juli 2006.

Runavíkar Kommuna

**Dagrøktin á Skála**
**Bryggjan 2**
**480 Skála**